# Á flog við breiðbands loysn

**Internet-fyritøkan, TeleTech, hevur skrivað undir samskiftisavtalu um nýtslu av FarIce-kaðalinum. – Væntandi er, at viðskiftafólkini fara at merkja hetta sum eitt umskifti frá motorvegi til flúgvibreyt, sigur Birgir W. Høgnesen, sølumaður hjá TeleTech**

SAMSKIFTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Internet-fyritøkan, TeleTech, var fyrsta felagið, sum fekk loyvi at taka upp kappingina á teleøkinum. Søguliga løtan var hin 26. mai 1999. Felagið varð annars stovnað í 1988 og tá eins væl og nú, var virkisøkið viðlíkahald av telduskipanum við sonevndum MainFrames, Mini maskinum og internetsølu.

## At fáa loyvi

Birgir W. Høgnesen, sølumaður, sigur, at tað fyrsta og tyngsta framlopið hjá TeleTech var at fáa fjarskiftisloyvið uppá pláss. Eftir tógvið stríð við nógvum teldubrøvum og fundum fekst loyvið frá myndugleikunum, sum ivaleyst vóru nakað ivasamir um, hvønn leiklut hetta lítla fjarskiftisfelagið kundi fáa á tann føroyska marknaðin.

Men, sigur Birgir:

- Hóast ivasamur, undirskrivaði Finnbogi Arge, táverandi landsstýrismaður, fjarskiftisloyvið, sum nú hevur leitt okkum út í útbyggingar kring landið. Alt hevur lagað seg øðrvísi, og síðan TeleTech fekk sítt loyvi, hava onnur feløg eisini fingið loyvi, og kappingin um marknaðin er økt.

Sølumaðurin sigur, at fyrsta útbyggingingarætlanin hjá TeleTech, nevnd Miðætlanin, varð gjørd í Havn, og við hesum fingu Argir og Hoyvík eisini sítt breiðband, sum nógv teknaðu seg fyri beinanvegin.

## Norðurætlanin

- Eg haldi, at tað stóra framlopið á leiðini hjá okkum var Norðurætlanin, sum hevði til endamáls at náa út við breiðbandinum til Klaksvíkar, Leirvíkar, Norðragøtu, Syðrugøtu, Gøtugjógv og til allan Skálafjørðin, heilt av Toftum og inn í Skálabotn.

Hann sigur, at felagið náddi hesum málsetningi, hóast hetta var ein tungur burður – við umsóknum um byggiloyvi til mastrar á fjøllunum.

- Vit kunnu harmast um, at breiðbandið ikki í fullan mun og beinanvegin kundi bjóðast út til privat, tí dentur í staðin varð lagdur á vinnukundar, sum hann tekur til.

Birgir vísir á, at við nýggju samskiftisavtaluni um FarIce-kapalin, kann TeleTech nú bjóða út breiðband til privat-brúkarar í Eysturoyarøkinum.

- Nú fara vit veruliga at satsa uppá bíligt breiðband til privat, sigur hann.

## Stór undirtøka

Á TeleTech hava tey roynt at skipað so fyri, at íløgur vera gjørdar, har nyttan fæst best burtur úr, og tí var næsta stigið at fáa Vestmanna, Leynar, Stykkið og Kvívík upp í netið.

- Tað mesta av seinnu hálvu av 2002, fyrra partin av 2003 og heilt fram til august 2003 varð útbyggingarætlanin, Vestur, gjøgnumførd. Tó er okkurt eftir at seta upp, til bygdirnar, Vestmanna og Kvívík, eru komnar uppí netið - og hinar koma um stutta tí.



*kiftisavtalu um nýtslu av FarIce-kaðalinum, og vit vænta, at brúkarin fer at merkja hetta sum eina broytinga frá motorvegi til flúgvibreyt, sigur Birgir og leggur aftrat, at TeleTech náddi broytingina frá grúsvegi til motorveg longu í 2002.*

Birgir sigur, at Vestmannna og Kvívík nú hava atgongd til breiðband frá TeleTech, og fyritøkan ásannar, at undirtøkan hevur verið stór í økinum.

- Tað gleðast vit um, leggur hann aftrat.

## Eingin risi

- So smáir, vit hóast eru í telehøpi, kunnu vit kortini fegnast um tey náddu málini, sum vit settu okkum í 1999. Vit skulu minnast til, at TeleTech ikki er nakar risi í telehøpi. Men eftir lutfalsliga stuttari tíð eru vit tó komin langt áleiðis.

Hann vísir á, at á samskiftisøkinum er gongd í alla tíðina, og herfyri skrivaði TeleTech so undir enn eina avtalu, ið felagið metir sum eitt stórt frambrot á leiðini.

- Vit hava skrivað undir eina samskiftisavtalu um nýtslu av FarIce-kaðalinum, og vit vænta, at brúkarin fer at merkja hetta sum eina broytinga frá motorvegi til flúgvibreyt, sigur Birgir og leggur aftrat, at TeleTech náddi broytingina frá grúsvegi til motorveg longu í 2002.

FarIce-kaðalin, sum liggur á havsins botni heilt úr Skotlandi til Føroyar og víðari til Íslands, letur upp fyri heilt nýggjum møguleikum.

- Vit, sum starvast hjá TeleTech, ætla veruliga at brúka hetta til fyrimuns fyri okkara verandi og komandi viðskiftafólk, sum fáa tilboð um gott breiðband.

Birgir leggur aftrat, at tey á TeleTech tosa innanhýsis um, hvat næsta framlopið verður, men fyrst og fremst verður breiðbandið marknaðarført í næstum.

## Pakkaloysnir

Sølumaðurin sigur, at innan ein mánaða kemur TeleTech á marknaðin við eini breiðbandsloys, sum ógvuliga nógv privatfólk hava spurt eftir.

- Við at taka eina loysn við bíligasta haldaragjaldinum, rinda viðskifta-fólkini eitt lágt mánaðargjald við eini ávísari fríari nýtslu. Er tørvurin hinvegin stórur, kann tú tekna eitt hald við hægri krónugjaldi um mánaðin, men tá ført tú eisini eina størri ókeypis gigabyte-nýtslu.

Birgir sigur, at TeleTech hevur koyrt við eini skipan sum ber í sær, at viðskiftafólkini hava rindað fyri tað, tey veruliga brúka, og hetta hevur riggað sera væl. Hesa skipanina kunnu viðskiftafólkini framhaldandi brúka, um so er, at tey halda, at tað er betri.

- Ókeypis gigabyte-nýtslan kemur at hava ta avleiðing, at einki er til hindurs fyri at taka niður myndir, tónleikaklipp, softvørur og annað, og avrokningin er óheft at tíðini, tú ert á netinum. Hetta letur seg gera, tí hetta hevur einki við telefonina at gera. Uppsetingin er ein antenna og ein leidningur í telduna, sigur hann.

## Stúra ikki

Birgir W. Høgnesen, sum frammanundan hevur fingist við tryggingar, stúrir ikki fyri kappingini um breiðbands viðskiftafólkini, tí, sum hann sigur:

- Tá ið tryggingarfelagið Trygd kom á marknaðin, kom eisini gongd á tryggingarmongdina hjá Tryggingarfelagnum hinumegin vegin. Eg vænti, at allir veitarar fara at fáa eitt sindur av køkuni, tí køkan er stór og kann skerast í pettir á ymiskan hátt, sigur sølumaðurin hjá TeleTech, Birgir W. Høgnesen, at enda.



*- So smáir, vit hóast eru í telehøpi, kunnu vit fegnast um tey náddu málini, sum vit settu okkum í 1999. Vit skulu minnast til, at TeleTech ikki er nakar risi í telehøpi. Men eftir lutfalsliga stuttari tíð eru vit tó komin langt áleiðis, sigur Birgir W. Høgnesen, sølumaður hjá TeleTech*



# Hugnaløta í Bátasavninum í Leirvík

**Í annaðkvøld klokkan 20 verður konsert og hugnaløta í áhugaverda og forvitnisliga Bátasavninum hjá Osmundi Justinussen í Leirvík**

HUGNALØTA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað verða kendu andlitini innan violin-og guitartónleik, Monika Stauss og Ólavur Jakobsen, sum fara at hava konsertina, Osmundur fer sjálvur at greiða frá savninum og hugleiða um bátar, reiðskap og annað. Ein annar leirvíkingur, Jógvan Elias Joensen, fer at lesa upp egnar yrkingar. Tað er eisini Jógvan Elias, sum hevur skrivað Leirvíkssangin.



*Ólavur Jakobsen og Monika Stauss fara at hava konsert í Bátasavninum í Leirvík í annaðkvøld*

## Gamla tíðin

Í Bátasavninum í Leirvík standa fimm gamlir bátar, harav fýra eru bygdir í Leirvík. Hetta eru bátar í fleiri støddum, úr 8-mannafari niður í trist. Teir fýra bátarnir eru bygdir av gamla Óla bónda og Símuni Jóhan.

Í miðhæddini í Bátasavninum í Leirvík, har bátarnir standa, hongur eisini størsti málningur, sum Sámal Toftanes hevur málað. Hesin er meira enn 10 fermetrar stórur og ímyndar Leirvíksbygd á teimum døgum, tá ið hesir bátarnir vóru ein partur av grundarlagnum undir bygdini. Í savninum eru eisini fleiri aðrir málningar.

Bátasavnið í Leirvík er eitt rættiligt mentanarsavn, har fleiri og fleiri tiltøk verða hildin, og fleiri og fleiri fólk vitja.

## Monika og Ólavur

Tey bæði, Monika Stauss og Ólavur Jakobsen, hava bæði drúgvar royndir innan tónleik. Monika er ikki minst kend frá Symfoniorkestrinum, og Ólavur er serliga kendur úr bólkinum, Aldubáruni. Tey hava bæði havt framførslur saman og saman við øðrum. Nú hava tey so konsertir saman, og eitt nú hava tey framført í Klingruni í Norðurlandahúsinum – og í annaðkvøld verða tey so at hoyra í Bátasavninum í Leirvík á violin og guitara.



*Osmund Justinussen, sum eigur Bátasavnið, fer at hugleiða um savnið, gomlu bátarnar, reiðskap og annað*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Skúlanæmingar í Runavík mótmæla

**Í morgun klokkan 10 fara næmingar, sum ganga í framhaldsdeildini í Runavíkar kommunu, at handa býráðsformanninum, Rodmundi Nielsen, eitt mótmælisskriv við ynski um fríøki rundan um skúlan í Runavík**

MÓTMÆLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Umstøðurnar hjá næmingunum í framhaldsdeildini í Runavíkar skúla eru alt annað enn góðar. Tað halda í hvussu er næmingarnir sjálvir. Trongligt er í skúlanum, og uttan um skúlan er einki fríøki, har næmingarnir kunnu njóta fríkorterini og fríløturnar, sum eru á skúlanum.



*Næmingar í framhaldsdeildini í Runavíkar kommunu mótmæla, at einki fríøki er uttanum skúlan í Runavík*

Einir 150 mæningar ganga í framhaldsdeildini í skúlanum í Runavík, og í vikuni hava hesir savnað inn undirskriftir til tess at mótmæla, at einki fríøki er uttanum skúlan.

Í gjár høvdu fleiri enn 100 mæningar skrivað undir mótmælisskrivið, sum verður handað býráðsformanninum, Rodmundi Nielsen, á býráðsskrivstovuni klokkan 10 í morgun.

Skrivið hjá næmingunum er dagfest, 1. apríl, men næmingarnir leggja dent á, at hetta er eingin aprílsøga, men ramasti álvari.

## Likams og sálar

Í skrivinum siga næmingarnir, at eitt fríøki uttan um skúlan hevði gagnað teimum til likams og sálar.

– Og sjálvandi hevði hetta eisini gagnað undirvísingini í skúlanum.

Næmingarnir siga í skrivinum, at sum er, er einki hjá næmingunum at gera í fríkorterinum.

– Hetta kann saktans føra til ymiskt annað »stuttligt«, sum næmingarnir siga í gásareygum.

Teir vísa á, at næmingarnir roykja, keypa og kanska hevnir onkur seg yvir teir annars so fáu møblarnar, sum eru á skúlanum.

At enda í skrivinum siga næmingarnir seg vóna, at býráðið tekur ímóti mótmælinum í sama góða anda, sum tað er skrivað og borið býráðnum.